## 12 ára gomul til US-open

Bert 12 ára gamli Alexis Thompson skrivar søgu, tá US Open í golf byrjar um tvær vikur. Talan er nevnliga um so yngsta luttakaran í søguni. Gamla metið átti Morgan Pressel, sum í dag er 19 ár. Alexis hevur vunnið seg gjøgnum undankappingina, og tí er hon púrasta vís í at taka lut í høvuðskappingini, tá hendan byrjar.



## Føroyar eitt pláss aftur

Sjálvt um føroyska fótbóltslandsliðið fekk tvey góð úrslit í EM-undankappingardystunum ímóti Italia og Skottlandi, so tykist hetta ikki hava nakra ávirkan á nýggja styrkislistanum, sum FIFA júst hevur almannakunngjørt. Á nýggjasta listanum er Føroyar nevniliga farið eitt pláss skeiva vegin, so teir nú liggja á einum 186. plássi. Størsta upplopið á listanum hevur Armenia staðið fyri, eftir teirra heldur óvæntaða sigur á Póllandi síðsta mikudag. Armenia er farið 48 pláss upp eftir listanum og liggur nú á einum 80. plássi. Ovast á listanum er Italia, meðan Frakland, sum er farið fram við bæði Brasilia og Týsklandi, nú liggur á øðrum plássi. Svøríki liggur ovast av Norðanlondunum á 17. plássi, Danmark liggur nummar 27, Noreg nummar 36, Finnland 42 og Ísland á einum 109 plássi.

# Útlendsk feløg biðla til Holst



*Tá Christian fekk kjansin frá byrjan móti skotum, tók hann so ruddiliga av. Í samfullar 90 minuttir var hann ein støðug hóttan móti skotsku verjuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sjálvur sigur landsliðsspælarin, at hann als einki veit um útlendskan áhuga. Og í øllum førum vil hann fyrst njóta løtuna, nú Lyngby hevur vissað sær uppflyting**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Millum føroyskar miðlar var breið semja um, at Christian Lamhauge Holst var størsta positiva føroyska ískoyti, tá skotar vitjaðu seinasta mikudag.

Sum bindiliður millum miðvøll og álop var hann ein av avgjørdu fortreytunum fyri føroyska trýstinum, sum skotar tó hóðraðu undan. Og meira enn ta einu ferðina var annars vælvaksna skotska verjan um ein háls av kropsliga sterka Lyngby-spælaranum.

Og sambært bold.dk, so eru tað eisini onnur, sum hava lagt hetta til merkis. Heimasíðan skrivar, at bæði hollendsk og ensk feløg hava sýnt spælarunum áhuga, og at hann í løtuni illa fær frið fyri feløgum, sum ringja til sín.

### Hevur einki hoyrt

Sjálvur sigur spælarin tó, at hann ikki veit nakað um nakran útlendskan áhuga.

- Eg veit líka so nógv ella lítið, sum øll onnur vita. Eg havi sáttmála við Lyngby, so um fyrispurningar eru, so eiga hesir at fara ígjøgnum teir. Og undir øllum umstøðum vil eg gjarna njóta løtuna her og nú. Sunnudagin vissaðu vit okkum uppflyting til superliguna, og beint nú er tað hetta, sum rúmar mest í mínum tonkum.

- So sjálvur vil eg gjarna njóta løtuna her, áðrenn eg fari at gera viðmerkingar til gitingar um tað, sum møguliga kann henda í framtíðini, sigur Christian Lamhauge Holst.

Skála – EB/Streymur:

# Bæði liðini ætla sær sigurin

**Sambært Egil á Bø vil EB/Streymur í steypafinaluna. Tí fara teir eftir einum sigri í kvøld. Liðformaðurin hjá Skála, Pauli G. Hansen, sigur at hjá teimum hevur steypakappingin alt at siga, og við tí er lagt upp til spennandi dyst í kvøld**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Skála ætlar sær ein sigur á EB/Streymi í kvøld, eins og teir gjørdu sunnudagin.

– Vónirnar eru rímiliga góðar, og sjálvandi fara vit eftir sigrinum í kvøld, soleiðis at møguleikarnir til seinna dystin eru góðir. Men vit vita hvørjum vit spæla ímóti. EB/Streymur er topplið, so tað verður ikki nemt, sigur Pauli G. Hansen.

Hann vil vera við, at hjá teimum hevur steypakappingin alt at siga.

– Vit blíva ikki nummar eitt í landskappingini, so í ár hevur steypakappingin allan týdning. Tað er har vit skulu gera okkum galdandi, sigur Pauli G. Hansen.

Til uppgávuna hevur Skála somu menn tøkar, sum til dystin sunnudagin. Poul Narvi Poulsen hevur trupulleikar við baklærinum. Annars eru allir mans tøkir.

EB/Streymur hevur uttan undantak allar mans tøkar. Tað sigur Egil á Bø, liðformaður, sum hevur góðar vónir til dystin í kvøld.

– Vit mugu arbeiða hart, stríðast og fáa spæli at koyra. Kanska hevur júst hetta ikki eyðkent EB/Streym í síðstuni, men vit síggja nú, at tað gongur ikki uttan hetta, so tað fara vit at broyta, sigur Egil á Bø, sum er ógvuliga avgjørdur, tá spurt verður um, hvat eitt gott úrslit hjá EB/Streymi er.

– Vit skulu í finaluna! Tí vilja vit eisini vinna dystin í kvøld, fyri at gera uppgávuna lættari á heimavølli. Vit fara ikki inn eftir javnleikinum, sigur Egil á Bø avgjørdur.

## Formula-liðið




*Sosialurin mannar Formula-liðið við spælarunum, sum stóðu seg best í 12. umfari av Formula-deildini*

HB – VB/Sumba:

# Sum tá Føroyar spæla

**VB/Sumba fer at liggja langt aftri í royndini at halda málið reint, meðan HB fer at leypa á við øllum monnum, tá liðini bæði hittast í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini í kvøld**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

VB/Sumba hevur allar mans tøkar, nú teir fara norður um fjørðin at spæla hálvfinaludyst móti HB í kvøld. Dan Djurhuus, liðformaður, sigur, at vónirnar eru góðar.

– Vit vóna at fáa eitt hampiligt úrslit. Tað er fyrst og fremst at halda nullið. Klára vit tað er tað ófært og eitt gott útgangstøði til seinnu hálvfinaluna, sum verður á heimavølli, sigur hann.

Hóast Dan Djurhuus sigur, at VB/Sumba fyrst og fremst fer at leggja seg eftir at halda málið reint, so afturvísir hann, at teir fara at grava seg niður í egnum brotsteigi. Hann sigur somuleiðis, at teir ikki óttast at spæla móti verandi meistarunum.

– Okur ræðast ikki altjóða hetjur, sigur Dan Djurhuus, og sipar til yvirskrift í Sosialinum mánadagin, tá skrivað stóð um sigurin hjá B71 á HB, at bygdamenn vunnu á altjóða hetjum.

Jákup á Borg er liðformaður hjá HB. Hann ásannar, at dysturin í kvøld ikki verður nøkur løtt uppgáva. Hann vísir á, at hóast HB vann sannførandi seinast liðini hittust, so er tað einki garanti fyri, at sama søga endurtekur seg í kvøld.

– Men hetta er ein semifinala og vit eru uppsettir. Vit eru fyrireikaðir upp á, at vit mugu skapa dystin, og eitt gott úrslit er ein sigur við meiri enn einum máli, sigur Jákup á Borg, sum leggur dent á, at teir ikki taka nakað fyri givið.

Til dystin í kvøld má HB vera Páll Mohr Joensen fyri uttan, umframt at Ólavur í Ólavsstovu er ivasamur.